VIÐMERKINGAR

# Eg vil tosa og lurta



VAL05

**Við at tosa og lurta skapar tú álit. Álit skapar samstarv. Samstarv skapar loysnir.**

**John Johannessen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Fólkatingið*

Tú vinnur ikki størri sjálvstýri við einum høgum tali av fyrispurningum á Fólkatingi. Tú vinnur heldur ikki størri sjálvstýri við hørðum røðum og stórum orðum.

Skalt tú vinna góðar loysnir, má tað gerast við greiðum málum og góðum samskifti við tey, sum hava vald til at finna loysnir saman við tær. Tú mást tosa og lurta. Harvið skapar tú álit og virðing og kanst sannføra hin partin um, at tínar loysnir eru góðar.

Eg eri til reiðar at fara á Fólkating at tosa og lurta. At skapa eitt gott samskifti við danskar politikarar. Ikki bert frá røðarapallinum í sjálvum fólkatingssalinum. Men eisini á teimum mongu skrivstovunum hjá donsku tinglimunum á teimum longu gangunum á Christiansborg. Tí tað er her, at tað veruliga samskiftið fer fram. Tað er her, at tað ber til at fáa donsku politikerarnar at skilja føroysk viðurskifti. Tað er her sambondini verða knýtt, alliansurnar verða gjørdar og loysnirnar verða funnar. Hetta havi eg sjálvur upplivað í mínum tíðarskeiði sum fjølmiðlamaður á Christiansborg.

### Vit hava málini

Javnaðarflokkurin hevur tey greiðu málini. Men javnaðarflokkurin sær ikki heimin svartan og hvítan. Hjá okkum er ikki bert talan um ja ella nei, fullveldi ella samband. Vit byggja øll mál á eina heild, sum hevur til endamáls at skapa eitt samfelag, har tað er liviligt hjá øllum samfelagsbólkum. Eitt væl virkandi samhaldsfast samfelag grundað á eitt sunt og væl virkandi vinnulív. Tí krevja okkara politisku mál ofta eina gjøllari frágreiðing enn bara ja ja ella nei nei.

Vit vilja hava eina yvirtøkulóg, sum flytir allar avgerðir um størri sjálvstýri heim til Føroya. Soleiðis verður tað Føroya fólk gjøgnum Føroya Løgting, sum ger av, hvørji málsøki skulu yvirtakast og nær tey skulu yvirtakast. Hendan yvirtøkulógin ger sjálvstýrismálið til eina reina føroyska søk. Tískil verða gomlu samanbrestirnir millum føroyskar og danskar myndugleikar søga. Fer nógv at henda við yvirtøkum, so er tað tí, at vit í Føroyum vilja hava tað so. Hendir lítið ella onki, so er tað eisini, tí at føroyingar sjálvir ynskja tað.

Yvirtøkulógin gevur ikki møguleika at taka fullveldi. Tí eftir henni ber ikki til at yvirtaka uttanríkis- og verjupolitikk, heimarætt, hægstarætt og pengapolitikk. Hetta eru mál, sum eru beinleiðis knýtt at sjálvum fullveldinum. Men fyri eisini at hava greiðar linjur fyri einari slíkari avgerð, arbeiða vit við einari stjórnarskipanarlóg, sum greitt skal lýsa, hvussu føroyingar skulu bera okkum at, um vit einaferð í framtíðini velja at fara úr ríkinum.

Javnaðarflokkurin vil eisini hava størri leiklut í altjóða heiminum. Hetta gera vit við at samráðast við danir um eina lóg, sum skal geva Føroyum møguleika sjálvt at samráðast við onnur lond og gera altjóða sáttmálar við onnur lond.

Tá hesi mál eru loyst í eini heild, hava vit føroyska ella kanska rættari yvirtikið sjálvt sjálvstýrismálið. Tá er onki at klandrast við danir um.

### Vit hava evnini

Enn er ætlanin ikki komin á mál. Danir hava enn ikki verið sinnaðir til at gera loysnina júst so, sum vit vitja hava hana. Eg velji at trúgva, at tað er tí, at okkara fólkatingsumboð í Danmark hava skapt ólag á samskiftið. Í staðin fyri at tosa og lurta hevur verið tosað og rópt. Harvið er virðingin horvin og sostatt eisini loysnirnar.

Við Javnaðarflokkinum á Fólkatingi ber til at fáa samskiftið aftur í rættlag og harvið grundarlag fyri loysnum. Við Javnaðarflokkinum á Fólkatingi ber til at fáa semju um sjálvstýrismálið og aftur fáa politikkin at snúgva seg um gerandisdagin hjá okkum øllum.

### Vit víðka sjónarringin

Tá fer at bera til at lurta eftir føroyskum áhugabólkum og at tosa teirra søk út í heim gjøgnum sambondini á Christiansborg. At lurta eftir vinnuni og tala søk hennara. At lurta eftir mentanarfólkunum og tala søk teirra út í heim. At lurta eftir granskingini og tala hennara søk. At lurta eftir tær og tala tína søk.

Meginpartin av mínum arbeiðslívi havi eg arbeitt við at tosa, lurta og vera kristiskur. Eg kenni mannagongdirnar á Christiansborg. Eg eri til reiðar við tínari hjálp at átaka mær leiklutin at tala okkara felags søk út í heim og harvið knýta sambond, skapa samstarv og finna loysnir.

### Er hetta gott samskifti?

Høgni Hoydal á Christiansborg 25. mai 2004

*"_.jeg synes ikke at danske partier kan ignorere det forhold, at blokstøtten også er en finansiering af det, jeg har kaldt en ekspansiv partipolitik på Færøerne. Disse penge bruges jo også af de politiske partier til at købe sig stemmer for. Og alt det her til sammen er med til at skabe et manglende ansvar og en ansvarsforflygtigelse på Færøerne."*

Spurningurin er í hesum føri, um útsøgnin gevur donskum politikarum eina rætta mynd av Føroyum. Tað lata vit lesaran sjálvan døma um.

*Kelda: Norðuratlantsbólkurin*

# Uppmøting løgtingsmanna



VAL05

**Kári P. Højgaard,**
*løgtingsmaður*

Sá á internetinum hálvárligu uppgerðina, har Sosialurin í heilsíðugrein viðger uppmøting tingmanna á Løgtingi undir heitinum: **"Sverre skulkar mest og Alfred er duksur"**. Síðan kemur yvirlit sum vísir: **"So nógv skulka tey"**; her er undirritaði skuldskrivaður fyri at hava skulka ein dag.

Hevði eina viðmerking 25. mai 2004 til grein, har líknandi skriving var í bløðunum. Tí kann tað tykjast nyttuleyst at royna enn einafer at gera vart við, at uppgerðin fyri hvussu ofta tingfólkini hava verið burtur greinar ikki fráveruna og at talan ikki altíð er um at skulka.

Umboð Sjálvstýrisflokksins er av Løgtinginum valt í Norðurlandaráðið og Útnorðurráðið og eigur sjálvsagt í mest møguligan mun at luttaka á teimum fundum, ið fyriskipaðir vera. Tað er sjálvsagt ógjørligt at møta í Havn, samstundis sum tú skal umboða Løgtingið uttanlanda. Møguleiki er at søkja um farloyvi hvørja fer, men tingskipan okkara krevur, at verður søkt um farloyvi so skal ein verða burtur frá tingarbeiði í minst 10 dagar.

Undirritaði sendi tí soljóðandi bræv til formanskapin í september.

*Sjálvstýrisflokkurin Saltangará hin 17. september 2004.*

***Formanskapur Løgtingsins***
*Att: Edmund Joensen Løgtingsformaður.*

*Undirritaði løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, vil hervið heita á formanskapin um at broyta mannagongd, tá fráboðanir um uppmøting løgtingsmanna til tingfundir verður almannakungjørd.*

*Tað kann ikki vera røtt mannagongd, at løgtingslimir, ið møta til fundar uttanlanda í nevndum, teir eru valdir í av løgtinginum og sostatt ikki kunnu møta samstundis á tingfundi, verða skrásett- ir sum,* ***vóru ikki á fundi.*** *Hetta hevur alment verið útlagt í fjølmiðlum sum "vanlig frávera" (skulking).*

*Her átti at verði viðmerkt, um tinglimurin umboðaði løgtingið. Tað sama átti at verið galdandi fyri løgtingsformannin, tá hann umboðar løgtingið uttanlanda.*

*Virðingarmest*

*Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*

Havi bert munliga fingið at vita, at formanskapurin hevur viðgjørt málið, men kenni onki til nakra niðurstøðu.

Havi altíð sett eina æru í at møta til arbeiðis hvønn dag. Minnist meg rætt, tað kann fyrrverandi arbeiðspláss mítt har eg starvaðist í 30 ár eisini váttað, møtti eg altíð til arbeiðis og hevði í øll hesi ár 3 sjúkrafráverur.

# Fólkatingssessurin, ES og Miðflokkurin



VAL05

**Jenis av Rana**

Mong eru, sum spyrja hví Miðflokkurin metir tað vera skeivt, um Føroyar gerast limir í ES. " Aðrar tjóðir ynskja limaskap og síggja slíkan at vera einastu bjarging, serliga fíggjarliga, so hví ikki vit"? verður ført fram. Lat meg í stuttum greina støðu okkara, eina støðu, sum er vorðin enn greiðari eftir undirritanina av nýggju ES grundlógini!

Fyrst av øllum ávarða vit móti ES vegna manglandi fólkaræði. Fólkaræði, t.v.s. demokrati, hevur altíð verið ein av hornasteinunum, samfeløg á okkara leiðum hava verið grundað á, men so er ikki við ES. Kann vera at týdningurin av hesum ikki hevur verið so avgerðandi, tey árini einkultu limalondini enn ikki høvdu avreitt størsta partin av avgerðarrætti sínum til samveldið. Men støðan í dag er at lokalu parlamentini fáa minni og minni at siga, meðan ES tekur yvir og fær størri og størri avgerðarrætt yvir einstøku limalondunum. Tvs. tey demokratiskt valdu lokalu tingini víkja fyri tí ódemokratiska og centralt stýrda ES veldinum.

Men álvarligari enn hetta er tað guðloysi, sum til fulnar vísti sítt andlit undir tilevnani av nýggju grundlógini. Tóat serliga katólsku londini stríddust til tað síðsta fyri at fáa kristnu sjónarmiðini við í ES grundlógina, máttu tey lúta, og vit fingu eina grundlóg, sum ikki hevði pláss fyri Gudi. Honum, sum í síðsta enda hevur alt vald, og mátt til at varðveita, ikki bert Føroyar, men øll viðurksifti ES landanna. Men tey vrakaðu Hann, og harvið ta hjálp, sum einans hann megnar at geva, tá á stendur. Harvið hava ES lond grava egnu grøv sína- og vit hava fingið enn eina orsøk til verja okkum móti innliman í hendan felagsskap.

Vit í Miðflokkinum síggja tað vera umráðandi, her heima, og í samskifti við aðrar tjóðir, aftur og aftur at minna á, at álit okkara ongantíð má gerast menniskju ella menniskja verk, verið tað tjóðir ella felagsskapir. Álit Føroya má vera Hann, sum aldri fer at svíkja tann, sum setur álit sítt á Hann- Skapari Himins og Jarðar. Hetta føra vit fram her heima, og á fólkatingi, um álit verður víst okkum til hetta.